# Sjálvhjálparbólkar fyri børn og ung

**Umleið 50 børn hava higartil verið við í sjálvhjálparbólkinum fyri børn og ung, sum hava mist foreldur ella systkin**

SJÁLVHJÁLP
*Tíðindaskriv*

Arbeiðið við sjálvhjálparbólkum fyri børn og ung, ið hava mist foreldur ella syskin, hevur nú hálvt annað ár á baki. Hetta tíðarskeiðið hava umleið 50 børn, í aldrinum 8 til 17 ár, verið við.

Bólkarnir eru samansettir eftir aldri. Møguleiki er fyri, at hava tveir bólkar í senn.

Hvussu aldurssamansetingin verður hesaferð, er greitt, tá vit vita, hvørji tekna seg.

Í sorgarbeiðinum eru kenslur og tankar, sum hesi børn og ungu kenna aftur hvør hjá øðrum. Tað hevur størsta týdning fyri tey, at vera saman við øðrum, sum hava uppliva stóra sorg. Hetta gevur teimum eina vitan um, at tey ikki eru einsamøll, og tað eru onnur børn, sum eru í somu støðu. Børn sum hava mist, føla seg ofta øðrvísi og einsamøll, bæði í skúlanum og ímillum vinir.

Fundirnir eru skipaðir soleiðis, at pláss bæði er fyri at práta, tekna, mála, spæla og ikki minst at hugna sær. Tað er sera umráðandi, at tað er trygt at koma til fundirnar, so hetta leggja vit stóran dent á.

Eftir at hava havt trý skeið, halda vit, at hetta tilboðið eigur at verða verandi. Tær afturmeldingar, ið eru komnar, hava verið positivar, og børnini og tey ungu hava sum heild verið ógvuliga trúgv at møta til fundirnar.

Tey, ið hava hug at verða við, kunnu venda sær til Annu S. Dalsgaard, tlf.: 319552/519552, ella e-mail: Janna@kallnet.fo

# Globaliseringin eisini galdandi fyri Føroyar

TÍÐINDASKRIV
*Norðuratlantsbólkurin*

- Vi skal styrke vores eget samfunds sociale sammenhængskraft og kulturelle identitet — og på det grundlag uddanne os til at klare os i en mangfoldig verden, segði Høgni Hoydal í setanarrøðuni á Fólkatingsins røðarapalli 24. februar

Føroyski fólkatingslimurin Høgni Hoydal var á Fólkatingsins røðarapalli, tá danska Fólkatingið varð sett hósdagin 24. februar 2005.

Røðan tók fyrst og fremst útgangsstøði í teimum avbjóðingum og spurningum, Føroyar og ríkisfelagsskapurin standa yvir fyri í eini alsamt vaksandi globalisering. Ljós varð kastað á, hvørjar fortreytirnar eru fyri at standa seg í alheimsgeringini, og viðmerkingarnar um ríkisfelagsskapin í nýggju donsku stjórnarskránni (regeringsprogramm) vórðu eisini viðgjørdar av føroyska fólkatingsumboðnum.

Av ítøkiligum málum tók Høgni Hoydal eisini málið upp um uttanríkispolitisku heimildarlógirnar og yvirtøkulógina. Avleiðingarnar av eini ES-grundlóg vórðu eisini uppi at venda, áðrenn spurningurin um limaskap í Norðurlandaráðnum til seinast varð viðgjørdur av føroyska fólkatingsliminum.

Til seinast boðaði Høgni formliga frá, at Norðuratlantsbólkurin heldur fram í danska Fólkatinginum.





## Skeið í innaneftirliti og matvørutrygd

Skeiðið er í trimum eindum.

| | | |
|---|---|---|
| Eind 1: | Heilsufrøðilig viðurskifti | 14. og 15. mars 2005 |
| Eind 2: | Innaneftirlitið í praksis | 29. og 30. mars 2005 |
| Eind 3: | Matvørutrygd, umheimurin og framtíðin | 11. og 12. apríl 2005 |

Málbólkur: Stjórar, góðskuleiðarar, formenn og starvsfólk annars, ið hava ein virknan leiklut í innaneftirlitsarbeiðinum og framleiðsluni á fiskavirkjum á sjógvi og landi og aðrari matvøruframleiðslu.

Skeiðshaldarar: Jákup Mørkøre, Drós í Ólavsstovu og gestaundirvísarar

Stað: Hotel Føroyar í Havn, allar dagar kl. 8.00 - 17.00

Skeiðskostnaður: Kr. 10.500, sum verður kravt inn undan skeiðinum (matur og tilfar er íroknað).

Endamál: Økja um luttakarans vitan um innaneftirlit og matvørutrygd við dynamiskum og aktivum frálæruhátti, har mál verða lýst og viðgjørd úr ymiskum sjónarhornum. Luttakarar verða førir fyri sjálvir at loysa spurningar viðvíkjandi innaneftirliti og matvørutrygd.

Innihald: Smáverulívfrøði, framleiðsluumhvørvi, reingerð, sjálvrøkt, vandamálsgreining, góðskuskoðan, skjalastýring, uppbygging og viðlíkahald av innaneftirliti.

Uppfylging: Møguleiki fyri uppfylging og hjálp á staðnum eftir lokið skeið er íroknað skeiðsgjaldið.

Freistin at boða frá luttøku er **8. mars 2005**. Tilmelding fer fram við at ringja til Fiskivinnuskúlan á tlf. 42 45 73, ella um teldupost: fiskvest@fiskvest.fo. Til ber eisini at senda ella faxa okkum innskrivingarseðilin niðanfyri. Tilmeldingin er bindandi. Skeiðið eru treytað av nóg stórari undirtøku.

FISKIVINNUSKÚLIN

Fiskivinnuskúlin
Postrúm 96
350 Vestmanna
Tlf. 424 573
fiskvest@fiskvest.fo

Innskrivingarseðil til skeið í innaneftirliti og matvørutrygd

| | |
|---|---|
| Eftirnavn: | Føðingardagur: |
| Fornavn: | Starv/arbeiðspláss: |
| Gøta: | Tlf. arbeiði: |
| Postnr./stað: | Tlf. heima: |
| Teldupostur: | Gjaldari: |

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Veðrið Bilar Lýsingar Tíðindi Viðmerkingar Ítróttur Nøvn Skráir Tiltøk

i Sosialurin

Lesið Sosialin -so eru tit við!